**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

# Skúlatænari til Føroya Studentaskúla í Hoydølum

**Eitt starv sum skúlatænari er leyst at søkja á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði frá 1. apríl 2009.**

**Uppgávur**
Á skúlanum eru 3 skúlatænarastørv og uppgávurnar eru: Umsjón við og røkt av bygningunum hjá stovninum, at røkja økið uttan um bygningarnar, eftirlit við hita-, vatn- og elskipan skúlans og at rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk og at vera til handa í dagligu viðurskiftum skúlans. Skúlatænararnir arbeiða í skiftandi vaktum og tí koma skeivar arbeiðstíðir regluliga fyri. Á skúlanum koma frá 1. apríl at starvast 2 skúlatænarar í fullum starvi og 2 í hálvum starvi, og nýggi skúlatænarin vísir til verandi 1. skúlatænara, ið er leiðari hjá skúlatænarunum og reingerðarstarvsfólkinum.

**Førleikar**
Tann, ið settur verður eigur at hava handverkaraútbúgving, gott yvirlit og góð evni at samstarva. Ávísur telduførleiki er ein fyrimunur. Somuleiðis er tað ein fyrimunur, men ikki eitt krav, um umsøkjarin hevur góðan førleika at handfara elektriska útgerð, s.s. teldur, ljóðútgerð og ljósútgerð. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt spennandi og fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvið verður at seta frá 1. apríl ella skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, telefon 312973 ella Gunnar Johansen, skúlatænara, fartelefon 214613.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og frágreiðingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. mars, kl. 12.00.






ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

# SETHÚS Í RUNAVÍK

Um hóskandi boð fast, verður ognin matr.nr. 91, 650 Toftir, liggjandi í Runavík, seld.

Talan er um eina serstaka ogn, ið liggur ógvuliga væl fyri mitt í Runavík við kaiøkið og við útsýnið yvir fjørðin. Partur av grundøkinum er planta og partur av grundøkinum er bøur.

Grundøkið er 638m². Húsini, sum eru bygd í 1968, eru í trimum hæddum. Miðhæddin er 130m², loftshæddin 86m² umframt lágan kjallara. Alt er innrættað undantikið kjallarin.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til undirritaða.

Sí eisini heimasíðu okkara www.jura.fo

**Advokatskrivstovuna**
Frúutrøð 4 · 100 Tórshavn · Tlf: 35 33 35
Att: Aksel V. Johannesen, adv. · avj@jura.fo
ella skrivaran:
Miriam Bjarnadóttir · mib@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# Feriuavloysari

**Vit sóknast eftir feriuavloysara frá 25. mai til 25. juni.**

Hans Joensen
Síðan 1889

**á Hálsi · tlf. 31 72 10 / 51 72 10**

# Aðalfundur

**Hjá Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags**

Aðalfundur grunnsins verður
**leygardagin 28. mars kl. 15.00**
í HB-húsinum í Gundadali, Tórshavn.

Dagsskrá sambært viðtøkum grunsins og møgulig viðtøkubroyting.

**Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags**

RUNAVÍKAR kommunuskúli
Postboks 138 · FO 610 Saltangará
Tlf. 477331 · fax 449549
rks@skulin.fo · www.skulin.fo/rks

# Varaskúlastjóri í Runavíkar kommunuskúla

**Starvið sum varaskúlastjóri í Runavíkar kommunuskúla verður lýst leyst til setanar frá 01. apríl 2009.**

Í Runavíkar kommunuskúla eru í løtuni 441 næmingar í 1. - 10. fl., og tað starvast 54 lærarar og hjálparfólk í skúlanum.

Runavíkar kommunuskúli er ein vælskipaður nútímans skúli við góðum arbeiðs- og læriumstøðum. Undirvísingin fer fram í trimum skúlabygningum, Glyvra skúla, Lamba skúla og skúlanum við Løkin. Í Glyvra skúla ganga næmingar í 1. - 3. flokki, í skúlanum við Løkin næmingar í 4. - 10. flokki og í Lamba skúla er skipað serligt undirvísingarumhvørvi fyri næmingar, ið hava autismu. Harumframt er ein serflokkur í Glyvra skúla og ein í skúlanum við Løkin.

Ábøtur eru gjørdar bæði í Glyvra skúla og Lamba skúla, so at bygningarnir líka undirvísingarligu krøvini, meðan skúlin við Løkin er ein nýggjur skúli.

Umframt neyðug flokshøli og serstovur er skúlin við Løkin tøkniliga væl útgjørdur.

Samvirknar talvur eru í øllum skúlastovum og í fleiri serhølum, og internet samband er í øllum skúlanum. Í Runavíkar kommunuskúla hava allir lærarar fingið farteldu.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsta samstarvsfólk skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri samávirkan og samábyrgd

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Runavíkar kommunuskúla. Tann, ið settur verður eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið verður lønt í lønarflokki 35.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er mánaðarlønin kr. 34.809,07.

Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Umsóknir við prógvi og CV skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. mars 2009 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til :**
*Runavíkar kommunuskúla*
*Postboks 138*
*FO-610 Saltangará*

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Duritu P. Joensen, skúlastjóra á tlf. 217331 ella 477331.